52-058/2020

FØROYA LØGMAÐUR

Tinganes, 22. desember 2020

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
100 Tórshavn

Viðv. skrivligum fyrispurningi sambært tingskipanini § 52 a frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni

Undirritaði hevur fingið frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, fyrispurning um setanir í nevndir og ráð síðani løgtingsvalið 2019 eftir tingskipanini § 52 a.

Í tingskipanini § 52 a, stk. tvey stendur, at spurningurin skal vera stutt og greitt orðaður, og møguligar viðmerkingar skulu vera stuttar og greiðar.

Spurningurin frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, er langur og sera umfatandi. Fyri at kunna svara spurninginum nøktandi, fari eg at heita á spyrjaran, umvegis umsiting Løgtingsins, um at seta skrivligan fyrispurning um viðurskiftini í nevnda fyrispurningi í staðin eftir § 53 í tingskipanini.

Vinaliga
Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Føroyar
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo